Fra: Elin Joensen
Til: Umhvørvismálaráðið
Cc: Astrid Reinert Øregaard
Emne: SV: Uppskot til broyitng í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) til hoyringar
Dato: 26. februar 2024 10:20:58
Vedhæftede filer: image001.png

Góðan dagin

Dátueftirlitið hevur hesa viðmerking til uppskot til løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin).

Til nr. 12 í "Viðmerkingar til ta einstøku greinina" stendur: "Nýggj KT-skipan verður ment til Barsilsskipanina. Sí LM-063/2023 Uppskot til løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina. Ætlanin er, at skipanin í størstan mun kann málsviðgera umsóknir um barsilspening sjálvvirkandi."

Av tí at tað ikki er heilt greitt, um tað bert er í nøkrum førum, at umsóknir ikki verða viðgjørdar sjálvvirkandi og *einans* er grundað á automatiska viðgerð ella um skipanin viðgerð umsóknir í størstan mun, og ein persónur (t.d. ein málsviðgerði) tekur endaliga avgerð í hvørjari umsókn, skal Dátueftirlitið minna á ásetingina í § 35 í Dátuverndarlógini sum sigur, at skrásetti eigur ikki at vera fyri avgerð sum einans er grundað á automatiska viðgerð, undir hesum profilering, og sum hevur rættarvirknað ella á líknandi hátt týðandi ávirkar viðkomandi.

Sum dømi fyri automatiska viðgerð kunnu nevnast avgerðir, sum hava við sær, at skrásetti fær noktað eina sosiala veiting. Ásetingin fevnir bara um avgerðir sum *einans* eru grundaðar á autimatiska viðgerð.

Vinarliga

Elin Joensen
Fulltrúi

Dátueftirlitið

Postboks 300
FO-110 Tórshavn

Telefon: +298 30 91 00
Beinleiðis: +29829 91 07
Teldupostur: dat@dat.fo
Heimasíða: www.dat.fo

Øll málsviðgerð á Dátueftirlitinum er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.

Fra: Kristvør H. Poulsen <KristvorP@umhvorvi.fo>
Sendt: 14. februar 2024 13:58
Til: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; skrivstova@akf.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Barsilsskipanin <barsil@taks.fo>; 'Bioanalytikarafelagið' <bio@olivant.fo>; 'blf@blf.fo' <blf@blf.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; 'Ergoterapautfelagið' <etf@etf.fo>; Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (info@sjukrarokt.fo) <info@sjukrarokt.fo>; Felagið Tænastumanna Landsins (mg@fve.fo) <mg@fve.fo>; Flogskiparafelag Føroya (runihog@yahoo.com) <runihog@yahoo.com>; Fysioterapeutfelagið <fys@fys.fo>; fafelag@fafelag.fo; fhf@fhf.fo; 'samtak@samtak.fo' <samtak@samtak.fo>; lararaf@lararafelag.fo; pedagog@pedagogfelag.fo; Føroya Reiðarafelag <shipown@olivant.fo>; fsn <fsn@fsn.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Studni <studni@studni.fo>; Samverk (S&K) <samverk@samverk.fo>; janra@ls.fo; hhff@hhff.fo; 'heilsurokt@gmail.com' <heilsurokt@gmail.com>; haf@haf.fo; lararaf@lararafelag.fo; Margret S. Jóhannsdóttir <margret@apotek.fo>; peturk@vh.fo; 'jorginv@tsk.fo' <jorginv@tsk.fo>; 'post@journalist.fo' <post@journalist.fo>; 'grafiskayrkisfelagid@gmail.com' <grafiskayrkisfelagid@gmail.com>; haf@haf.fo; 'hak@hak.fo' <hak@hak.fo>; 'marjusdam@gmail.com' <marjusdam@gmail.com>; 'tga@kost.fo' <tga@kost.fo>; lfh@lfh.fo; 'ljm.foroya@gmail.com' <ljm.foroya@gmail.com>; mf <mf@mf.fo>; 'pimmi@olivant.fo' <pimmi@olivant.fo>; 'theol@hotmail.com' <theol@hotmail.com>; 'mlf@mlf.fo' <mlf@mlf.fo>; 'kaf@kaf.fo' <kaf@kaf.fo>; 'industry@industry.fo' <industry@industry.fo>; 'yf@yf.fo' <yf@yf.fo>; 'ytf@ytf.fo' <ytf@ytf.fo>; 'starvsfelag@starvsfelag.fo' <starvsfelag@starvsfelag.fo>; 'marfr@ls.fo' <marfr@ls.fo>; Javnstøðunevndin <javnstoda@javnstoda.fo>; 'mfs@mfs.fo' <mfs@mfs.fo>; jmh@vh.fo; lisa.frederiksberg@ls.fo
Emne: Uppskot til broyitng í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) (Hækkan av útgjaldshámarkinum, barsilspeningur til nýútbúgvin o.a.) verður hervið send tykkum til hoyringar.

Høvuðsendamálini við uppskotinum eru at hækka mánaðarliga hámarkið fyri barsilspeningi úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr. og at geva nýútbúnum betri rættindir í Barsilsskipanini. Harumframt verða nakrar fylgibroytingar gjørdar orsakað av broytingum í aðrari lóggávu, og tí at nýggj KT-skipan verður ment til Barsilsskipanina.

Kunnað verður um, at politisk semja er um at gera fleiri broytingar í barsilslógini í komandi tingsetu, har m.a. hesi evnir verða tikin upp: betri sømdir til foreldur at tví- og fleirburum og ov tíðliga føddum børnum, minsta útgjald og fleksibilitetur, tá ið barsilsfarloyvið skal leggjast til rættis.

Hoyringarfreistin er sett til **mánadagin 26. februar kl. 12:00.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til umhvorvi@umhvorvi.fo og cc til astridr@umhvorvi.fo

Vinaliga
Kristvør Poulsen, skr.
Umhvørvismálaráðið